Almanna- og heilsumálaráðið

# Løgfrøðingar til Almanna- og heilsumálaráðið

Av tí, at ein av løgfrøðingum okkara á nýttárinum tekur við nýggjum avbjóðingum, verður søkt eftir løgfrøðingi til fasta setan í Almanna- og heilsumálaráðnum skjótast til ber.

Ein annar av okkara løgfrøðingum er í farloyvi, tí verður eisini søkt eftir avloysara til setan skjótast til ber og til 30. juni 2006.

**Sum løgfrøðingur verða uppgávur tínar** at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir, at svara fyrispurningum frá løgtinginum við løgfrøðiligum innihaldi og at tulka lógir og reglur fyri stovnar undir Ráðnum.

**Førleikakrøv:**
Tú hevur prógv sum cand. jur. ella cand. merc. jur. Ert tú í ferð við at gera teg lidnan við lesnað, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Starvsroyndir frá miðfyrisitingini ella aðrar løgfrøðiligar starvsroyndir er ein fyrimunur. Harumframt hevur tú góð samstarvsevnir og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Hevur tú aðra viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla, og henda lýsing vekir tín áhuga, skalt tú ikki halda teg aftur at søkja, tí um ongin, sum lýkur omanfyrinevndu krøv søkir, er møguleiki hjá øðrum at verða sett ístaðin.

**Starvið sum løgfrøðingur** er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú fært góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi eftirútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Umsókn** við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálaráðið**
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. januar 2006 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóra, teldupost eydunmh@ahr.fo, tlf. 30 40 50.

Vit draga eina línu • Vit seta skynsemi í hásæti • Vit vilja vita • Vit bróta slóð.

*Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.. Sí meira á www.ahr.fo*

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Leiðari til KT-tænastuna á Fróðskaparsetrinum

KT-tænastan hevur ein týðandi leiklut í menningini av Fróðskaparsetri Føroya. KT-tænastan hevur ábyrgdina av teldunetinum hjá stovnunum á Debesartrøð og nær -netinum á Fróðskaparsetrinum. Hon skal stuðla setursdeildum og brúkarum við KT-nýtslu. Hon skal samstarva og samskifta við stovnar og KT- veitarar uttan fyri Fróðskaparsetrið. KT-tænastan skal ráðgeva setursráðnum í yvirskipaðum KT-málum frameftir. Tað krevur tænastusinnað fólk, sum bæði eru tøkniliga væl fyri og hava visjónir.

**Vit vænta, at tú hevur:**
- drúgvar royndir við at menna og skipa strategiskt KT-arbeiði
- neyðuga førleikan at leggja framtíðar ætlanir fyri KT-økið
- persónligu eginleikarnar at fremja ætlanir í verki
- hægri útbúgving ella viðkomandi royndir innan kunningartøkni
- leiðsluroyndir og góð samstarvsevni
- tænastusinni og visjónir

**Vit bjóða:**
- mennandi og spennandi arbeiðsumhvørvi
- samstarv við fremstu føroysku granskararnar
- løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Tað tekniska:**
KT-tænastan fevnir um Windows- og Linuxskipanir á brúkarateldum, Novellnetskipan og Novell GroupWise postskipan, Windows Server 2003, Microsoft ISA server 2003, MicroSoft SQL server 2000, Sophos Anti-virus, Veritas BackupExec Server, sum stýrir einum IBM 3582-23L tape library, SysAid HelpDesk, HP SAN 1000 diskar, Cisco routarar og Switch'ir, sum umsøkjarar mugu hava hollan kunnleika til. Harafturat er Fróðskaparsetrið í gongd við at innføra ISO-17799 trygdarstandardin. Høvuðsbrúkarabólkarnir eru granskarar, undirvísarar, fyrisitarar og studentar, sum brúka KT-skipanir dagliga til samskifti, gransking, undirvísing og fyrisiting. Dagliga arbeiðið av datanetinum á Debesartrøð fevnir í stuttum um:
- at hava eftirlit við kjarnuskipan og samsvarandi samskiftisútgerð
- at viðlíkahalda felags trygdartænastur hjá stovnunum
- at samskifta og samstarva við netvørðarnar á teimum fimm stovnunum
- at umsita web-, ftp-, navna- og postambætararnar
- at samskifta við veitarar av KT-útgerð sum heild
- at samskipa dagføringar, umleggingar og útbyggingar í netskipanini

**Treytir og umsóknir**
Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Nærri upplýsingar um starvið og tøknilýsing kunnu fáast við at venda sær til Anniku Sølvará á telefon 352500 ella teldupost annikas@setur.fo ella til Hans Birgir Højgaard, KT-leiðara á 352570 ella birgirh@setur.fo

Umsóknir við prógvum, ævisøgu (CV) og møguligum viðmælum skulu stílast til Setursskrivstovuna í seinasta lagi 11. januar 2006. Starvið verður sett frá 1. mars 2006 ella skjótast til ber.

**Umsóknir skulu sendast til:**
**Setursskrivstovuna**
**J.C. Svabos gøtu 14**
**Postrúm 272**
**FO-110 Tórshavn**

www.sosialurin.fo

# Limagjald fyri 2006

Limagjaldið fyri 2006 verður óbroytt 600 krónur um kvartali og fellur til gjaldingar í ávikavist januar, apríl, juli og oktober.

Møgulig eftirstøða í hesum árinum, eigur at verða goldin áðrenn 31. desember 2005.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømis**
490 Strendur · Tlf. 449212 · Telefaks 449232
T-post adressa: sjkhil@post.olivant.fo

# Bátaskrásetingin fyri Norðstreymoy

1. januar 2006 verður bátaskrásetingin fyri Norðstreymoy flutt til Skipaskráseting Føroya, Heykavegi 6, Postboks 347, 110 Tórshavn.

Skipaskrásetingin hevur tlf. nr. 353030.

**Føroya Landfúti,**
**27. desember 2005**

Karen Marie Olesen

# Timbursveinur søkist

Til timburverkstað okkara á Marknoyri í Vági, verður søkt eftir handverkara, ið kann arbeiða sjálvstøðugt, og sum kann standa fyri framleiðslu av timburelementum til sethúsamarknaðin við meira. Umframt at standa fyri elimentframleiðslu á verkstaðnum kann viðkomandi í periodum rokna við, at arbeiða í miðstaðarøkinum.

Hevur hettar tín áhuga, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Herman Olsen á tlf. 212434.

SH BYGG
**Sp/f S. H. Bygg**
**v/ Herman Olsen**